# dagur hjá Muzafer



*Muzafer er heppin at sleppa í barnagarðin. Her hugnar hann sær saman við hinum børnunum – og henda eina dagin eisini saman við Atla Godtfred frá Reyða Krossi í Føroyum*
*Mynd: Snorri Brend*

Tað gjørdu tey so, men hesi fremmandu fólkini – sum nú ikki vóru so fremmand longur, men vinir teirra – hjálptu teimum íðin at arbeiða við hesum.

Jú, hesin dagurin hevði verið øðrvísi enn allir hinir. Ein góður dagur!

**Heimavitjan**

Hevði hesin dagurin verið øðrvísi, so varð dagurin eftir eisini ein minniligur dagur í lívinum hjá Muzafer.

Hesir fimm føroyingarnir vístu seg at vera sera vinarligir og fyrikomandi, og tóktust bara vilja Muzafer og øllum hinum børnunum tað besta.

Tað var tó serliga tann eini - ella rættari sagt: tann eina - av hesum fremmandu, sum hann fekk tokka til: Ein blíð, vinarlig og sera virkin kvinna við ljóstlitaðum hári.

Hann hevði sæð hana tann dagin, tá Suni kom á vitjan, men í øllum ganginum og stákanini hevði hann valla lagt merki til hesa kvinnuna. Men hon hevði lagt merki til hann.

Tá Muzafer fór úr skúlanum henda dagin hevði hann fingið eini boð heim við til foreldrini og hini í húsinum. Henda føroyska kvinnan og ein blaðmaður vildu fegin koma á gátt hjá teimum næsta dag – hósdagin.

Hann fekk ikki alt við, sum tey søgdu honum, men tíbetur arbeiddi omma hansara við at vaska í barnagarðinum. Hon hevði eisini fingið hetta at vita, soleiðis at tey har heimi kundu vera so væl fyrireikað uppá hesa vitjanina sum gjørligt.

Muzafer visti tó, at hetta fór at gerast ein øðrvísi vitjan. Tí tey, heima hjá honum, høvdu so aldrin áður havt vitjan úr Føroyum, tað sum hann visti um.



*Muzafer og Suleman eru javngamlir og bestu vinir. Suleman eigur eina súkklu, meðan Muzafer eigur nógvar leikur heima við hús.*

**Málleysur**

Tá hann var liðugur í barnagarðinum skundaði hann sær heim. Hann sansaði hvørki hini børnini ella vinmenn sínar á leiðini. Nú ráddi bara um at skunda sær heim at siga hinum frá tí, sum skuldi henda dagin eftir.

Hann fekk tó sagt besta vinmanni sínum - Suleman - frá at hann mátti skunda sær, tí at hann hevði eini týdningarmikil boð til mammu og pápa sínum.

Suleman helt at hetta ljóðaði øgiliga spennandi, men fekk ikki fatur á Muzafer, tí hesin hevði slíkan skund. Hann ætlaði at spyrja hann, hvat var á vási, men tað var ikki hugsingur um slíkt, tí slík ferð var á vinmanninum.

Muzafer skundaði sær heim, og fekk næstan ikki orðið upp sum hann tivaði. Hann royndi at siga fram tað, sum hann var biðin um, men mamma hansara skilti púrt einki av tí, hann segði:

- Vitjan. Suuuni. Heim í morgin. Føroyingar. Mynd.

Meiri fekk hon ikki úr honum, so algoystur var hann. Mamman, Sabina bað hann seta seg niður eina løtu og renna møðina av sær. Og so fekk hon søguna um henda serstaka skúladagin, sum als ikki hevði verið sum hinir.

**Heppin næmingur**

Mamman sat stillisliga á sofuni í stovuni og lurtaði eftir tí hann segði.

Her var so nógv at siga frá, tí hetta hevði verið ein so spennandi dagur, og sum hevði kravt so nógva orku av øllum.

Hann náddi ikki at siga frá øllum, tí hann sovnaði í sofuni áðrenn hann var heilt liðugur.

Ein tíma seinni vakti mamma hansara hann, og segði at Suleman var komin at spyrja eftir honum.

Suleman hevði súkkluna við, og hana plagdu teir at skiftast um at brúka.

Muzafer reyk á føtur, og skundaði sær út. Har stóð súkklan og har stóð Suleman.

Men fyrst mátti hann enn einaferð greiða frá øllum tí, sum hann hevði upplivað í skúlanum í dag. Og frá tí, sum skuldi henda í morgin.

- Tú ert so heppin, at tú sleppur í skúla, og kanst uppliva alt hetta. Eg vildi so fegin sloppið í skúla eisini, men vit hava ikki ráð.

- Kanska eg sleppi einaferð seinni, sigur Suleman. - Men kom, nú fara vit at súkkla!



*Muzafer eigur onga súkklu, men tað ger vinmaður hansara Suleman. Men tað stendur ikki á hjá Muzafer at læna súkkluna, tá teir spæla saman úti á gøtuni í sigoynara-býlinginum*